# VIÐTØKUR

# OG REGLUGERÐIR

## Viðtøkur

fyri Føroya Keypssamtøku **3**

## Reglugerðir:

Arbeiðsskrá hjá limanevndunum **17**

Reglugerð fyri starvsfólkaumboðan til stjórnarfundir **20**

Reglugerð fyri starvsfólkaumboðan til limanevndarfundir **22**

Reglugerð fyri Stuðulsgrunn FK **24**

Galdandi frá 2010

Prentgerð og prentumsiting: Pf. Gramar

# Viðtøkur Føroya Keypssamtøku

## 1. Navn, skipan, fíggjarlig hefting og bústaður

### § 1

Navnið á keypssamtøkuni er
FØROYA KEYPSSAMTØKA, L/F stytt FK.

Keypssamtøkan er eitt lutafelag.

Keypssamtøkan heftir við øllum ognum sínum mótvegis limum sínum.

Limirnir hefta bert við innskoti sínum.

### § 2

Miðstøð hennara er í Tórshavnar kommunu.

FK tekur upp limafeløg, har limatalið er nóg stórt, og har stjórnin fyri FK annars heldur líkindi vera til tess.

## II. Endamálið

### § 3

Endamál FK er at útvega limunum í felag og undir so góðum treytum sum gjørligt góðar og óspiltar vørur, og á annan hátt gagna áhugamálum brúkaranna, eitt nú við

1. at veita limunum upplýsingar um nýtslu, eginleikar og prísir á vørum og tænastum,
2. at veita limum og almenningi upplýsingar um viðurskifti í samfelagnum og hjá fyritøkum, ið týdning hava fyri húsarhaldið og tað virksemið, sum samtøkurørslan ger fyri brúkararnar, um grundarlagið undir henni og um, hvussu hon er skipað.

# III. Limir

## 1. Treyt fyri limaskapi

### § 4

Øll kunnu gerast limir, tá tey eru myndug, ótreytað av starvi og samfelagshugsan. Innlimanin skal vera skrivlig.

Umframt einstaklingar kunnu stovnar, skúlar, feløg o.tl. gerast limir, tá ið stjórnin heldur tað vera hóskandi. Hesi verða í hvørjum einstøkum føri at meta sum ein limur, við somu rættindum sum vanligir limir. Gevst felagsskapurin/stovnurin við virki sínum, fellur limaskapurin burtur.

### § 5

Hvør tann, ið gerst limur, skal skriva undir eitt serstakt upptøkublað.

Tá ið limur verður upptikin, fær hann eitt eintak av viðtøkum FK og limakort, og verður hann at ganga undir hesar viðtøkur, bæði soleiðis, sum tær eru, tá ið hann verður limur, og soleiðis, sum tær seinni verða broyttar.

Tá ið limur verður upptikin, skal hann gjalda limagjaldið, sum aðalfundurin hevur ásett. Hesin peningur verður settur í tiltaksgrunn FK. Yvir limirnar verður ført yvirlit, ið altíð skal vera álítandi.

### § 6

Hvør valbærur limur hevur skyldu til at taka við vali til álitisstarv í FK.

Verður limur afturvaldur í sama starvið, ella valdur í annað starv, hevur hann ikki skyldu at taka við valinum, fyrr enn farin er líka long tíð, sum hann seinast sat í starvi.

### § 6

Hvør valbærur limur hevur skyldu til at taka við vali til álitisstarv í FK.

Verður limur afturvaldur í sama starvið, ella valdur í annað starv, hevur hann ikki skyldu at

taka við valinum, fyrr enn farin er líka long tíð, sum hann seinast sat í starvi.

### § 7

Limirnir í FK hefta ikki fyri fíggjarligu skyldum hennara. Einans FK sjálv, við ognum sínum, heftir fyri skyldur sínar.

### 2. Um at fara úr FK

### § 8

Ein limur kann altíð siga seg úr FK. Men gyldug uppsøgn skal altíð vera skrivlig, og skal beinast til stjórnina.

Verður prógvað, at limur arbeiðir ímóti FK, ella at hann grovt misrøkir sínar skyldur móti FK, kann stjórnin eftir tilmæli frá limanevndini á staðnum gera av at limurin verður strikaður. Boðað verður skrivliga frá hesum.

Viðvíkjandi rættinum til part av rakstrarlánskontoini hjá limum, ið eru farnir úr FK, verður víst til reglurnar í grein 9, triðja og fimta brotið.

## IV. Peningaognir FK

### § 9

Peningur, ið er neyðugur til raksturin hjá FK, fæst til vega við peningaíløgum í tiltaksgrunn, sbr. grein 11, fjórða broti, og møguligum lánum, sbr. grein 10. Harumframt kann peningur útvegast á tann hátt, at limirnir stovna rakstrarlánskonto.

Av árliga ágóðanum, sbr. grein 11, kann stjórnin gera av at ein partur av hesum verður fluttur á rakstrarlánskontoina.

Á rakstrarlánskontoini hevur hvør limur sína serkonto. Av hesum peningi verða latin 4% í rentu, ið verður tilskrivað kontoini. Inngjøldini skulu standa bundin í 15 ár. Frá 16. árinum verður í minsta lagi 1/15 av ágóðanum goldin avvarðandi limi. Tá nýtist hann ikki at gjalda meira inn á kontuna.

Tá limur fyllir 67 ár, kann hann fáa pening sín útgoldnan av rakstrarlánskontoini. Tá nýtist hann ikki at gjalda meira inn á hesa konto.

Tá ið limur doyr ella flytur av landinum, kann saldoin á rakstrarlánskontoini verða útgoldin eftirsitandi/honum beinan vegin. Sigur limur seg úr FK av øðrum orsøkum, ella verður koyrdur úr FK, verður saldoin á kontoini útgoldin honum, tá ið 3 ár eru umliðin. Tó kann stjórnin gera av, at saldoin verður útgoldin honum beinan vegin.

Peningur á rakstrarlánskontoini ábyrgist ikki fíggjarligu skyldum FK.

Um tørvur er á hesum, kann stjórnin, um so er at 2⁄3 ella meira av stjórnarlimunum atkvøða fyri at gera broytingar í framman fyri nevndu ásetingum, gera av, at eingin renta verður tilskrivað rakstrarkontoini, smbr. 3. petti, eins og ásetast kann, at peningur fyribils heldur ikki verður goldin limi út av hesari rakstrarlánskonto.

Áseting stjórnarinnar kann bert verða gjørd fyribils og kann í mesta lagi vera galdandi í 5 ár. Um skipanin skal vera galdandi meira enn 5 ár, er neyðugt at avgerð verður tikin um hetta á aðalfundi.

Fráboðan um avgerð stjórnarinnar ella aðalfundsins um spurningarnar, sum nevndir eru frammanfyri, verður kunngjørd limunum við uppslagi í handlunum ella skrivliga.

## § 10

Stjórnin hevur rætt til at taka upp lán og seta føstu ognir FK í veð fyri slík lán, so mikið sum hon heldur vera neyðugt til at tryggja FK góðan og tryggan rakstur, sbr. grein 25.

# V. Roknskapur o.a.

## § 11

Roknskaparárið hjá FK er álmanakkaárið.

Ársroknskapurin verður gjørdur upp eftir vanligari metan av virðum og skyldum, og soleiðis at neyðugar avskrivingar verða gjørdar. Roknskapurin skal altíð vísa, hvussu støðan er hjá FK, so væl sum stjórnin er før fyri at ætla um. Stjórnin hevur ábyrgdina av, at roknskapurin verður gjørdur væl og virðiliga, og at hann verður latin grannskoðarunum í góðari tíð.

Er hall frá farna ári, ið ikki er avskrivað, skal avlop fyrst fara til slíkar avskrivingar. Av avlopinum, ið tá er eftir, verða fyrst avskrivað 20% av keypsvirðinum og av leysognunum.

Av avlopinum, ið tá er eftir, verða 5% løgd í tiltaksgrunn, til hesin grunnur svarar til 5% av bruttoognum FK.

Avlopið, ið tá kann vera eftir, kann annaðhvørt býtast út til limirnar í mun til, hvussu nógv hvør einstakur limur hevur keypt av vørum, ið gevur rætt til ágóða, samanber tó reglurnar um rakstrarlánskonto í grein 9, ella hann verður fluttur yvir á næsta árið.

Skal peningur úr tiltakgrunninum nýtast til annað enn at gjalda veruligt rakstrarhall, verður málið at leggja fyri ein aðalfund. Í uppskotinum til aðalfundin skal gjølla skilast til, hvat peningurin skal nýtast til, og at stjórnin hevur ábyrgdina av, at pengarnir verða nýttir soleiðis, sum skotið verður upp. Uppskotið verður ikki samtykt, uttan at í minsta lagi 5⁄6 av teim umboðaðu atkvøðunum greiða atkvøðu fyri uppskotinum.

# VI. Myndugleikar FK og leiðsla

## § 12

Myndugleikar FK eru: limanevndirnar, ársfundirnir, aðalfundurin og grannskoðararnir.

Leiðsla FK er stjórnin.

Dagliga leiðsla FK er stjórin. Hann hevur dagligu leiðslu FK um hendi undir fyrisæti stjórnarinnar.

Teir einstøku deildarstjórarnir eru daglig leiðsla á teimum einstøku deildunum við ábyrgd mótvegis stjórn og stjóra.

## 1. Limanevndirnar

## § 13

Tey ymisku limafeløgini í FK hava hvør sína limanevnd.

Fleiri handlar (deildir) kunnu vera undir sama limafelag. Tá nýggjur handil (deild) verður stovnaður, tekur stjórnin støðu til, um hann skal roknast sum eitt sjálvstøðugt limafelag við egnari limanevnd, ella hann verður lið í einum verandi limafelag.

## 2. Ársfundirnir

## § 14

Hvørt limafelag boðar limum sínum til ársfund í februar/mars á hvørjum ári.

Fundirnir skulu lýsast í fjølmiðlum og handlunum við minst 14 daga freist. Í lýsingini skal standa nær uppskot til ársfundin skulu vera limanevndini í hendi.

Fundarskráin er henda:

1. val av fundarstjóra
2. val av fundarskrivara
3. frágreiðing um viðurskiftini hjá limafelagnum og øllum FK í farna ári, m.a. fíggjarstøða hjá handlinum (deildini) og FK sum heild
4. uppskot frá stjórn, nevnd ella limum
5. orðaskifti um pkt. 3 og 4

6. val av stjórnarlimi/limum
7. val av limanevnd
8. val av stjórnartiltakslimi/limum
9. fráboðan um, nær og hvar aðalfundurin verður hildin.
10. ymiskt

## § 15

Limanevndin kann kalla inn til eykaársfund, tá hon heldur tað verða neyðugt.

Limanevndin hevur skyldu til at kalla inn til eykaársfund í seinasta lagi 14 dagar eftir, at aðalfundurin ella í minsta lagi 25 limir í limafelagnum skrivliga hava kravt hetta við tilskilan av fundarevni.

Boðanin um eykaársfund, sum skal siga frá dagsskránni, verður gjørd á sama hátt, sum tá lýst verður til vanliga ársfundin. Freistin skal ongantíð verða styttri enn 8 dagar.

## § 16

Í limanevndini skulu vera 5 limir, harav ein er stjórnarlimur. Eisini verða valdir tveir tiltakslimir. Nevndarlimirnir skulu vera myndugir.

Nevndarlimir verða valdir fyri tvey ár í senn. Líka ár fara 3 frá og ólíka ár fara 2 limir frá. Tiltakslimir verða valdir hvørt ár.

Bæði nevndarlimir og tiltakslimir kunnu afturveljast.

Tiltakslimirnir skulu taka við, tá ið einum nevndarlimi berst frá, ella hann fer frá í ótíð. Fyrst valdi tiltakslimur tekur fyrstur við o.s.f.r

Limanevndin skipar seg sjálv við formanni, næstformanni og skrivara. Næstformaðurin tekur við, tá ið formanninum berst frá.

Nevndarlimur skal sjálvur boða tiltakslimi frá at møta fyri seg og skal formaðurin hava munnlig ella skrivlig boð um hetta. Hevur nevndarlimur ikki boðað tiltakslimi frá, kann formaðurin boða viðkomandi tiltakslimi at møta.

Limanevndin skal virka fyri sama endamáli, sum nevnt í § 3, og vera bindilið millum limir og stjórn, og annars arbeiða eftir einari arbeiðsskrá, sum stjórnin og limanevndirnar samtykkja í felag.

Limanevndin skal eisini kalla saman til limafundar, tá ið tørvur er á tí.

Starvsfólkið í hvørjum handli (deild) sær, hevur rætt til at velja eitt umboð til limanevndarfundir. Starvsfólkaumboðini verða vald eftir reglugerð, sum er góðkend av aðalfundinum. Starvsfólkaumboðini hava talu- og uppskotsrætt, men ikki atkvøðurætt.

Limanevndin umboðar limafelag á aðalfundi FK.

## 3. Aðalfundurin

### § 17

Á tí árliga aðalfundinum, sum hildin verður í mars ella apríl, umboða tær ymisku limanevndirnar hvør sítt limafelag. Stjórnin ger av í samráð við limanevndirnar hvar tann næsti árligi aðalfundurin skal haldast.

Atkvøðurætt á aðalfundinum hava stjórnar- og limanevndarlimir, og hevur hvør av teimum møttu eina atkvøðu.

Aðalfundurin hevur innanfyri tey mark, sum viðtøkur og rættarvenja áseta, hægsta myndugleika í øllum málum viðvíkjandi FK.

### § 18

Uppskot frá limum ella limanevndum til aðalfundin mugu vera stjórnini í hendi í seinasta lagi 14 dagar fyri aðalfundin. Annars kunnu tey ikki koma til viðgerðar.

Stjórnin boðar skrivliga við minst 10 daga freist stjórnar- og limanevndarlimum til aðalfundar. Samstundis liggur roknskapurin frammi fyri limunum í øllum handlum FK.

Í fundarfráboðanini verður sagt frá fundarskránni.

## § 19

Vanligi ársaðalfundurin hevur hesa fundarskrá:

1. val av fundarstjóra
2. val av fundarskrivara
3. frágreiðing frá stjórnini frá farna árinum
4. grannskoðaður roknskapur verður framlagdur við uppskoti um, hvussu møguligur vinningur skal nýtast
5. orðaskifti og góðkenning av pkt. 3 og 4
6. góðkenning av stjórnarlimum og tiltaksstjórnarlimum, valdum á ársfundunum
7. val av grannskoðarum og tiltaksgrannskoðarum
8. innkomin mál
9. ymiskt

## § 20

Aðalfundurin er viðtøkuførur, tað sama hvussu nógv umboð eru á fundi.

Avgerðir verða tiknar við vanligum meirluta, uttan tá ið viðtøkurnar krevja nakað annað.

Fundarstjóri og fundarskrivari verða valdir við at rætta hondina upp. Tað sama verður galdandi við øðrum atkvøðugreiðslum, uttan so at kravd verður skrivlig atkvøðugreiðsla.

Fundarstjóri og fundarskrivari undirskriva fundarfrásøgnina.

## § 21

Stjórnin kann kalla saman til eykaaðalfundar, tá ið hon ynskir tað. Stjórnin hevur skyldu til at kalla saman til slíkan fund í seinasta lagi 14 dagar eftir, at í minsta lagi tvær limanevndir ella í minsta lagi 25 limir og ein limanevnd skrivliga hava kravt eykaaðalfund og við tilskilan av fundarevni. Eykaaðalfundurin er altíð viðtøkuførur.

Boðanin um eykaaðalfundin, sum skal siga frá dagsskránni, verður gjørd á sama hátt, sum

tá ið lýst verður til vanligan aðalfund. Freistin skal ongantíð verða styttri enn 8 dagar.

## 4. Stjórnin
### § 22

Í stjórnini sita eitt umboð fyri hvørt limafelag, valt á ársfundinum hjá limafelagnum og góðkent á aðalfundinum. Eru fleiri handlar í limafelagnum, fær hvør handil sítt stjórnarumboð.

Stjórnarlimirnir skulu vera myndugir.

Nývaldu stjórnarlimirnir taka við aftaná aðalfundin.

Stjórnarlimirnir verða valdir fyri 2 ár í senn soleiðis, at ávikavist størra helvtin fer frá líka ár og minna helvtin fer frá ólíka ár.

Bert aðalfundurin kann seta stjórnarlim frá í ótíð.

Eins nógvir tiltakslimir sum stjórnarlimir, verða valdir. Tiltakslimirnir verða valdir millum valdu limirnar í limanevndunum. Tiltaks limir verða valdir fyri eitt ár í senn.

Stjórnarlimi, sum berst frá, skal boða tiltakslimi sínum frá og samstundis skal stjórnarformaðurin hava munnlig ella skrivlig boð um hetta.

Starvsfólkini í FK hava rætt til at velja sær eitt umboð til sína vegna at taka lut í stjórnarfundum. Starvsfólkaumboðið verður valt eftir reglugerð, sum aðalfundurin hevur góðkent. Starvsfólkaumboðið hevur talu- og uppskotsrætt, men ikki atkvøðurætt.

Stjórnin skipar seg við formanni og næstformanni.

Næstformaðurin tekur við í øllum førum, tá ið formanninum berst frá, ella tá ið hann leggur frá sær í ótíð.

### § 23

Stjórnin hevur leiðsluna í keypssamtøkuni samsvarandi galdandi viðtøkum, hesum viðtøkum og teimum viðtøkum, sum aðalfundurin ger.

Stjórnin ger samtyktir og setir upp karmar, sum tað handilsliga virksemið skal virka innan fyri, fyri at røkka endamálum samtøkurnar.

Stjórnin setir stjóra at standa fyri tí handilsliga virkseminum og deldarstjórar at standa fyri tí dagligu leiðsluni av deildinum.

Stjórnin skal gera skrivligan sáttmála við stjóra og deildarstjórar.

## § 24

Formaðurin kallar stjórnina saman, skipar samráðingarnar og ansar eftir, at bók verður førd yvir tað, ið samtykt verður. Formaðurin umboðar FK eisini í rættarmálum.

Stjórnin er viðtøkufør, tá meirlutin er á fundi.

Stjórnin skal royna at tosa seg til semju. Eydnast hetta ikki, verður atkvøtt. Stendur á jøvnum, vinnur tann parturin, sum fær atkvøðuna hjá formanninum. Meirlutin í stjórnini kann krevja, at stjórnarfundur verður hildin í seinasta lagi tríggjar dagar eftir, at hann skrivliga hevur boðað formanninum frá hesum.

## § 25

FK bindur seg við undirskrift:

1. stjórans
2. formansins og næstformansins saman, ella tá
3. formaðurin ella næstformaðurin, saman við tveimum stjórnarlimum, skriva undir

Tá føst ogn verður keypt, seld ella veðsett og tá talan er um at borga ella veita aðra ábyrgd, krevst stjórnarsamtykt smbrt. § 24.
Stjórnin kann veita umboðsfulltrú.

## 5. Grannskoðan
## § 26

Á vanliga ársaðalfundinum verða valdir tveir grannskoðarar og tveir tiltakslimir. Teir

skiftast um at fara frá hvørt árið, fyrsta árið við lutakasti. Teir kunnu afturveljast.

Stjórnin ásetur samsýning teirra.

Teir skulu hava kassaeftirlit í minsta lagi tvær ferðir árliga.

Teir kunnu krevja at síggja øll skjøl, sum teir biðja um.

Teir skulu verða fráboðaðir, tá ið vøruteljingar fara fram, og fáa upplýsingar um alt, teir ynskja at vita.

Viðmerkingar sínar føra teir í eina grannskoðarabók. Bókin skal leggjast fyri stjórnina, og stjórnarlimirnir skulu við undirskrift síni í bókini vátta, at teir hava lisið viðmerkingarnar.

Roknskapurin eigur at grannskoðast hjá ríkisgóðkendum grannskoðara (virki). Hesin/hetta verður valdur/valt av stjórnini.

## VII. Vørukeyp og søla

### § 27

Stjóri og deildarstjórar standa fyri vøruútflýggjanini, sambært teimum fyriskipanum, sum FK hevur gjørt fyri tey, og annars sambært teimum reglum, ið ásettar verða í sáttmálum millum FK og tey.

### § 28

Eru ikki loyvi fingin frá stjórnini, mugu vørur bert verða latnar móti kontantum gjaldi.

Í handlunum skal altíð vera eitt limayvirlit, ið er fullfíggjað og álítandi.

### § 29

Øllum í leiðandi starvi og øllum í stjórnini er bannað at taka móti samsýning av nøkrum slag, beinleiðis ella óbeinleiðis, í sambandi við vørukeyp, vørusølu ella annað virki í FK.

Umframt revsing sambært galdandi viðtøkum hava slík brot við sær, at viðkomandi fer úr starvi uttan uppsøgn, sum hann/hon varð settur í, ella úr sessi, sum viðkomandi varð valdur í.

# VIII. Avgerðir í ósemjum innan FK

## § 30

Verður ósemja millum FK og ein ella fleiri limir um mál viðvíkjandi FK, og kann ósemjan ikki greiðast við samráðingum, ið stjórnin skal fyrireika, verður málið lagt fyri gerðarrætt.

Í gerðarrættinum sita tríggir gerðardómarar. Av teimum velur stjórnin ein og limirnir, ið bera fram kæruna, velja ein.

Báðir partarnir velja í felag ein formann, ið hevur avgerandi orðið, um hinir báðir partarnir ikki fáast at semjast um ein úrskurð.

Semjast báðir partarnir ikki um ein formann, skal sorinskrivarin seta hann út.

Gerðardómarar og formaðurin nýtast ikki vera limir í FK.

Gerðardómurin er endaligur og kann ikki skjótast inn fyri dómstólarnar.

Úrskurðurin hjá gerðarrættinum skal fyriliggja í seinasta lagi 14 dagar eftir, at málið er lagt fyri gerðarrættin.

# IX. Broytingar í viðtøkum FK

## § 31

Broytingar í hesum viðtøkum krevja, at 3⁄4 av teimum umboðaðu atkvøðunum á aðalfundi greiða atkvøðu fyri uppskotinum.

FK kann samskipast við aðrar keypssamtøkur, tá ið uppskot um hetta verður samtykt av stjórnini og síðani viðtikið á aðalfundi av 3⁄4 av teimum umboðaðu atkvøðunum.

# X. Um avtøku av FK

## § 32

Uppskot um at avtaka FK skulu leggjast fyri ársfundirnar í limafeløgunum, sum skulu

gera sítt tilmæli, og síðani skal uppskotið samtykkjast á tveimum fylgjandi aðalfundum, um 3⁄4 av teimum á aðalfundinum møttu samtykkja uppskotið á báðum fundunum. Millum aðalfundirnar skulu ganga í minsta lagi tvær vikur og í mesta lagi 4 vikur.

Tá ið lýst verður til aðalfund um at avtaka FK, eru freistirnar tær somu, sum tá ið lýst verður til aðalfund, men tá skal fráboðast skrivliga til allar limirnar í FK.

## § 33

Á aðalfundinum, ið endaliga samtykkir at avtaka FK, verða valdir ein ella fleiri avtøkustjórar. Teir skulu sum skjótast fara undir at selja allar ognir FK og greiða allar skuldir, so langt sum inntøkurnar av søluni røkka. Verður ágóði av samlaðu søluni, skal peningurin nýtast til menning av samtøkurørsluni í Føroyum á líknandi økjum og í sama anda, sum FK hevur virkað, soleiðis sum avtakandi aðalfundurin ásetir.

*Seinast broytt á aðalfundi 24. apríl 2010*